SOSIALURIN

Nr. 62 — 29. AUGUST 1964 — 37. ÁRG.

Í DAG

»Tað er nakað sum eitur at gera rís fyri sína egnu....«
(Dagblaðið)

Dagblaðið — og lýsingarillska

Øvundin og óndskapurin hjá Dagbladnum hevur ongatíð kent mark sitt.

Men tá Dagblaðið fær ilt av, at SOSIALURIN eins og onnur bløð roynir at fáa sær lýsingar — so gerst einki við tað — vit kunnu bert siga: hvat rakar tað Dagblaðið?!!

Vit hava sagt tað fyrr, kunnu taka tað uppaftur: SOSIALURIN umboðar størsta veljarabólkin í Føroyum og liggur í útbreiðslu fremst — rokna vit ikki almenna lýsingarblaðið Dimmalætting uppí.

Tað er okkum ikki ókunnugt, at Dagbladsmenn hava ilt av, at handilsmenn og felog lýsa hjá okkum, men løgi var, um teir seljandi ikki lýstu í okkara blað; teirra áhugi er væl at selja mest møguligt, og tí var tað ringur handilspolitikkur, um tað blaðið, sum umboðar landsins størsta flokk, skuldi boykottast fyri lýsingar.

Tað er hent fyrr, men neyvan fáa Dagbladsmenn skundað undir hetta einaferð enn!

Flokkurin

JAVNAÐARFLOKKURIN — OG DANSKUR STUÐUL

Javnaðarmenn kring um allan heimin standa fylktir og rætta hvørj um øðrum bróðurhond, tí hin dagliga samvinnan flokka og landanna millum er alneyðug, um alheimssosialisman skal sigra.

»14. september« ber nú tey tíðindi, at javnaðarmenn fáa stóran stuðul frá partamonnum sínum í Danmark.

Hetta veit »14. sept.« sjálvandi einki um; men hesar gitingar (her illgitingar), eru tíbetur ikki heilt av leið, tí ringir flokksbroður vóru sosialistar, um teir ikki altíð vóru hvørjum øðrum góðir í ráðum og veittu hvørjum øðrum tann politiska stuðul, ið allir sosialistaflokkar altíð hava fyri neyðuni í teirra bardaga móti øllum afturhaldi.

Her verður bara talað um danskan stuðul; men um »14. sept.» hevði vitað um allan tann stuðul føroyski javnaðarflokkurin fær frá sínum flokksbroðrum í Svoríki, Noregi og Íslandi, so hevði blaðið ógvast við.

Men hvussu við útlendskum stuðuli til »14. september«?

Brævkassin

Brævkassin.

Nú stundar so væl móti fólkatingsvalinum, at mongum hevði dámað væl at sæð tey seinastu valtølini uppá prent.

Kanska tit gera mær og okkara lesarum tann beina at endurtaka hesi tøl.

Við javnaðarkvøðu
J. M. P.

SVAR: Hetta gera vit fegin. Fyri betur at kunna gera sammetingar, endurtaka vit eisini valtølini frá næstseinasta vali; men sum tað skilst, luttóku bert triggir flokkar hetta valið, meðan 5 flokkar luttóku seinasta fólkatingsval.

	1962 atkv.	1956 atkv.
Javnaðarflokkurin	3709	1976
Sambandsflokkurin	2350	2322
Fólkaflokkurin	2153	2589
Karsten Hoydal	2036	
Kjartan Mohr	547	

Brøv til Sosialin

TIT TJÓÐVELDISMENN!

Mangir av tykkum siga, at tit eru sosialistar.

Tit siga, at tit vilja berjast móti peninga- og stórmannavaldinum, afturhaldinum, sum fyrst og fremst fólkaflokkurin umboðar.

Vit javnaðarmenn berjast móti øllum stórmannavaldi og øllum afturhaldi, ikki minst fólkaflokksafturhaldinum.

Tykkara flokkur hevur ikki stillað upp til fólkatingsvalið — sostatt fáa tit ikki beinleiðis høvi til at striðast móti afturhaldinum.

Vit javnaðarmenn hava stilla okkara valevni til fólkatingsvalið, og vit vilja leggja alla okkara orku í striðið móti øllum afturhaldi.

Tit tjóðveldissosialistar — so mangir, tit eru — fylkist við okkum á valdeginum hin 22. september — so fella vit afturhaldið!

Rógvi á Hamri.

Landbúnaðurin

Íslendski landbúnaðurin

Íslendski landbúnaðurin hevur tikið seg væl fram, serstakliga seinni árini. Hetta er eina mest orsakað av tí stóru nútímansgerð, ið farin er fram.

Roknað verður við at 15 pst. av Íslandi er bygt land, 13 pst. eru jøklar, vøtn og áir. Í 1920 var hitt dyrkaða lendið 23.000 ha, nú eru 80.000 ha dyrkaðir. Djórahaldið er mest neyt og seyður. Við árslok 1960 vóru fenaðartølini hesi:

1000 stk.	1920	1940	1950	1960
Neyt	23	40	43	53
Seyður	579	628	402	834

Samstundis við økingini av fenaðartalinum er eisini framleiðslan av landbúnaðarvørum økt rættuliga nógv. Vit skulu her endurtaka framleiðslutølini fyri mjólk og kjøt:

	Mjólk	Kjøt
1940	59,6 milj. l.	11,3 milj. kg.
1950	73,4 milj. l.	9,2 milj. kg.
1960	108,0 milj. l.	19,0 milj. kg.

Skrivað verður um...

»POLITIKKURIN Í MORGIN« í Dimmalætting. Blaðið dregur fram tað, ið avrikað varð undir seinasta landsstýri, og tað, ið var í umbúna, m. a. byggjan av fiskavirkjum, sum kundu verið tøk, nú kvotaskipan okkara í Bretlandi er so avmarkað; men sum sum blaðið sigur, alt vendað í ongum verðsins skili«. Blaðið ger eisini upp við lorkasligu stoðu landsstýrisins í sambandi við umrødda limaskap okkara í EFTA og sigur m. a.:

»Um Føroyar vóru spardar fyrí tí sokallaðu »sjálvstýrissamgongu«, hevdu vit í dag byggingar í lag av flakavirkjum á ymsum hóskandi plássum í landinum, um somu tíð, sum vit vóru — hóast mótstøðu frá flokkum, sum tá vóru í minniluta — fullan limaskap í sama handilsbólki sum tað land, sum í dag handilsliga vil okkum ann.«

eyðgað

HVUSSU STENDUR TIL HJÁ »SJÁLVSTÝRISSAMGONGUNI«?

Herfyri stóð harmargrein at lesa í »14. september« um hina sokallaðu »sjálvstýrissamgonguna«, sum byggir á ein sáttmála, sum »er skrivaður uppá kvamsvís«. Um samarbeiðið verður sagt:

»Men samarbeiðið í royndi og veru visir, at tað er ein spurningur, um tað loysir seg at halda fram við hesum politiska samarbeiði, tí tað tykist sum fleiri og fleiri fjaðrar detta av sjálvstýrisnavni landsstýrisins.«

Viðari í greinini verður so støðan endaliga gjørd upp, og blaðið kemur til hetta úrslit:

»Samantikið kann sigast, at vit — nú tala vit fyri blaðið og ikki fyri flokkin — hava litlan hug at stýðja eitt landsstýri, ið bert ber sjálvstýrisnavn til tess at pynta og fjala út yvir afturhalds- og sambandspolitikk«.

Ritstjórin

EISINI EIN HEIMSREKORD

Tað er ikki altíð hitt tespuligasta arbeiðið innanfyri ítrótt at vera fótbóltsdómari; men summum fellur tað lætt, og mangir hava mong ár á baki í hesi yrkisgrein. M. W. Bailey úr Northamton í Onglandi, sum nýliga fylti 82 ár, eigur ivaleyst heimsrekordina á hesum øki. Hann hevur í 44 ár verið dómari í 3375 fótbóltsdystum. Hann er framvegis livsfriskur, sjálvt um hann skilar til:

»Tá eg var 75 ár kundi eg lættliga rønna 15 km, men nú eri eg longu móður, tá ið eg havi runnið 10 km. Eg eri vorðin gamal«.

Veitst tú

AT ein toskur gýtir umleið 7 miljónir egg, men at í meðal, verður bara eitt av hesum mongu eggum til ein fullkomnan fisk.

AT ein einkja í Johannesburg í Suðurafriku hevur testamenterað ogn sína — 650.000 kr. — til skotsk sekjapipuorkestur fyri at tey betur skulu verða før fyri at »breiða teirra vakra tónleik kring heimin.«

AT finski fiskimaðurin Kokkainin nýliga var fyri rættinum, ákærd ur fyri at hava buka konu sína við einum livandi álli, hann varð dømdur fyri djórapinslu!

AT á 2000 favna dýpi er trýstið so stórt, at tað svarar til vektina av 20 góðsvognum, lastaðir við jarnbreytaskinnarum.

AT í 1901 kom út í USA ein leksikon, har tað undir orðinum URAN stóð at lesa: »Virðisleyst hvitt metal.«

AT í Ameriku selja teir nú náttlampur, sum slókna, so skjótt onkur fer at snorka.

AT glasblásing er eitt handverk, sum tók seg upp longu á døgum Augustus, keisara.

aðrir siga

UM AT RÁÐA OG YVIRTAKA

Loysingar-, fullveldis- og yvirtøku skrólið í Dagblaðnum er við at tagna. Nú vilja fólkaflokksmenn bert »ráða mest møguligt« og ikki yvirtaka fyri »at fólk uttan grund skulu koma at gjalda meira.« Uppgáva Dagblaðsins innanfyri samgonguna tykist nú hin eina: at verja flokksins nationala afturhaldspolitikk. Blaðið sigur m. a.:

»... at fólkaflokkurin hevur á stevnuskrá sini, at vit skulu ráða mest møguligt, men samstundis hevur av fólkaflokkinum á tingi verið sagt, at yvirtøkur verða ikki framdar fram eftir fummum.

... við so ótaldum og dýrum uppbyggingaruppgávum hevur eingin av okkum áhuga av bara at yvirtaka fyri yvirtøkurnar skuld, soleiðis at fólk uttan grund skulu koma at gjalda meira.«

hugskot

DEMOKRATIIÐ ER VORÐIÐ ARBEIÐSGEVARI LISTSINS

Danski mentamálaráðharrin Julius Bomholt sigur, at listarpolitikkur statsins ikki er at nema við listarfrælsið, tí listarmaðurin er mest virðismikil, tá hann skapar tað, hann sjálvur vil og á tann hátt, hann sjálvur vil. Tá ið demokratiið er arbeiðsgevari, eigur listin hesi lík indi. Viðari sigur hann, at tað er góð tekin til, at mentanin tekur seg fram, tí

1. bókaútlánið og bókasølan økist.
2. øll hoyra radio og siggja TV.
3. vitjaninar á listarsovnunum økist.
4. sølan av góðari brúkslist økist.
5. listamálararnir selja meira enn áður,
6. repoduktiónsølan økist,
7. háskúlarnir siga frá nógv størri umsøkjaratali enn teir kunnu taka

BARNA-MATUR

KROSSORÐ



Yvir: 1) tól 6) røddir 7) stykkjatal 9) svar 10) tvey 12) drykkur 14) ím 10) tóni 17) slag 19) turkaður.

Niður: 1) likam 2) byrða 3) leið 4) kroppur 5) vætan 8) tóni 11) djór 13) sot 15) hvil 18) dism.

Skipafelagið Føroyar

greiðir allan fluttning

á sjógvi
á landi
í luftini

Bíleggið ferðaseðlar

Pf. Skipafelagið Føroyar

Tlf. 1225

AGN

Nýfryst HAVSILD á goymslu.

P-F BACALAO

tlf. 1360.

BORT UT

+ er tað makaleyst av fólkaflokkinum, sum sigur seg vilja avtaka fólkatingssessirnar og sum + samstundis er uppí í einari landsstýrissamgongu, sum hevur + sett sær til endamáls at slíta flest møgulig bond við Danmark m. a. við at avtaka fólkatingssessirnar, at stilla upp til + fólkatingsvalið — og verst av øllum: biðja fólk velja ein so + høvur- og halaleysan flokk!



— Fyrr í tíðini hevdu mong ov mikið og enn fleiri ov lítið, í dag eru tað fleiri og fleiri, sum ongatíð fáa nóg mikið!

—o—

VERTURÍN: Tygum skylda húsaleigu fyri 6 mánaðir, so nú mugu tygum finna eitt annað stað at búgva í.

Leigarin: Rýma hiðani áður enn eg havi goldið tað, eg skyldi. Aldri.

—o—

Tað eru tey, ið altíð skulu siga sína meining, sjálvt um tey onga hava.

—o—

— Tá ein steikir fisk, skal fiskurin flóta í smøri; men tá ið talan er um reyðsprokur, kann ein spara uppá smørið, um ein ber seg rætt at.

— Hvussu tá?

— Jú, um ein setur tær upp eftir liðini, meðan ein steikir tær.

—o—

—Fiskur, sum verður tilgjørdur við ongum kryddarium, smakkar sum ein kossur — frá systur sinari!

12.000 FØROYINGAR

lesa SOSIALIN tvær reisur um vikuna — eisini tær ódýru lýsingarnar. Ein lýsing í SOSIALINUM loysir seg. Veruleikan um føroyskan politikk í løtuni fært tú best í SOSIALINUM.